# Vit taka saman um skránna yvir Fjarðastevnuna

**Í dag klokkan 16 verða tey fyrstu tiltøkini á Fjarðastevnu, sum eru fleiri fótbóltsdystir millum børn**

Fjarðastevna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Skráin fyri stevnuna byrjar longu í dag, mikudagin, tá ið fleiri fótbóltsdystir millum dreingir og gentur eru á skránni. Lagt verður fyri klokkan 16, tá ið pinkur og smápiltar fara á vøllin, og klokkan 20 verður seinasti dysturin leiktur, sum er ein dystur í dreingjadeildini. Hósdagin er aftur ein dystur á skránni. Hesin byrjar klokkan 20, og tá fara lið í gentudeildini út á vøllin. Fríggjadagin klokkan 16 verður aftur ein dystur í smádreingjadeildini.

Sambært skránni fyri fríggjadagin verður Brandstøðin á Skála opin fyri børnum klokkan 17, og tá fáa tey pylsur og annað.

Fríggjakvøldið verður eisini brotssparkskapping fyri børn, og klokkan 19 verður bassaprix og dansishow í Ítróttarhøllini og sjavskapping í Pensjónistahúsinum.

### Skrúðgonga

Veruliga stevnuskráin byrjar leygardagin klokkan 13.30, tá ið skrúðgonga verður úr skúlanum inn á havnalagið, har stevnan verður sett klokkan 14.

Klokkan 14.30 letur tivoli upp á kappróðrøkinum, og har verða eisini hoppiborgir, matsøla og annað.

Áhugaverdi djóragarðurin, sum verður í rættini omanfyri Ítróttarhøllina, letur upp klokkan 17, og har verður eisini ponyríðing. Víkingar verða eisini við, tá ið djóragarðurin letur upp.

Klokkan 18.30 verður dukkusjónleikur í frítíðarskúlanum, og ein tíma seinni letur tivoli upp á økinum sunnanfyri fótbóltsvøllin, har stórt grillkvøld við undirhaldi, felagssangi og midnáttarsamkomu verður so hvørt, sum leygarkvøldið líður.

Sum vanligt á stevnum, endar leygarkvøldið við góðum dansi í Ítróttarhøllini.

### Hæddarpunktið

Sunnudagin byrja flestu tiltøkini klokkan 15, tá ið listaframsýningin í skúlanum letur upp. Tivoli og hoppiborg verða aftur á økinum sunnanfyri fótbóltsvøllin, og dukkusjónleikurin í frítíðarskúlanum verður uppafturtikin.

Hæddarpunktið sunnudagin verður landskappingar- og steypadysturin millum Skála og TB í bestu deildini.

Klokkan 16 letur djóragarðurin uppaftur við ponyríðing og víkingum, og klokkan 18 verður brotssparkskapping fyri vaksin.

Endin á sunnukvøldinum byrjar klokkan 19.30 við hugnaløtu í skúlanum.

Sp/f Andersens Beding

**Báta/skips motorar frá 10 til 1000 HK.**



- Ljóðleysir
- Reinir
- Álítandi

- Upphálingar
- Allar umvælingar av jarn, træ og glastrevjabátum
- Søla, íseting og umvælingar av motorum v.m.
- Alt arbeiði innan rustfrítt og aluminium, so sum línurennur, egningartraktir, mastrar og annað

Ring á tlf 44 89 87 / 74 89 87

**Sp/f Andersens Beding**
FO-490 Strendur
TEL 44 89 87 / 74 89 87
beding@post.olivant.fo
www.nannidiesel.com

Sosialurin 341800

*Josi*
Nógv nýtt heimkomið. Nú Fjarðastevna er, lata vit -20% av allari klædnavøru.

*Ur & Optik*
Hjá okkum fáast smykkur, ur, dópsting og annað. Eisini Stelton, Rosendahl, og Hardanger bestikk

**Fríggjadagin hava vit opið til kl. 22.00**
**Leygardagin frá kl. 10.00 - 14.00**

*Josi*
Tel 441450
Skála

*Ur & Optik*
Tel 441566
Skála

Í SAMA HØLI

GÓÐA STEVNU

TONDEO SALONG

Upplatingartíðir:

| | |
|---|---|
| Mánadag | stongt |
| Týsdag-mikudag | 09-19 |
| Hósdag-fríggjadag | 09-17 |
| Leygardag | 09-12 |

Vit ynskja øllum eina góða Fjarðastevnu

TONDEO SALONG